Dagf. 2. mars 2022
HMR j. nr. 22/04002-6

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-131/2021 eftir § 52a) í tingskipanini um langar bíðitíðir í barna- og ungdómspsykiatriini, frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvussu langar eru bíðitíðirnar í barna- og ungdómspsykiatriini ?
2. Hvussu nógv børn og ung eru á bíðilista?
3. Hvussu nógv børn verða útgreinað um vikuna ?
4. Hvussu er tørvurin á innleggingum í barna- og ungdómspsykiatriini ?
5. Hvat verður ítøkiliga gjørt fyri at samskipa betur við eitt nú Sernám og Gigni ?

Svar:

Til spurning 1
Í løtuni verður mett, at bíðitíðin til útgreinan í Barna- og ungdómspsykiatriini er umleið 18 mánaðir.

Til spurning 2
Í løtuni eru 211 børn og ung á bíðilista til útgreinan. Aldursbýtið er hetta:128 børn í aldrinum 0-11 ár og 83 ung í aldrinum 12-17 ár.

Til spurning 3
Í miðal verða trý útgreinað um vikuna. Sambært Landssjúkrahúsinum er ein útgreiningartilgongd umfatandi og fevnir um bæði at heinta inn upplýsingar frá foreldrum, skúla og stovni, umframt at gera ymsar kanningar, testir og eygleiðingar. Ein útgreining kann tí taka alt frá nøkrum vikum til fleiri mánaðir.

Sambært Barna- og ungdómspsykiatriini hava tey seinastu tíðina lagt til merkis, at nógv dømi eru um, at avbjóðingarnar og niðursetti trivnaðurin hjá børnunum ongantíð er lýstur áður, og tí hava tey ongantíð fingið nakran stuðul og hjálp, áðrenn tey møta teimum í Barna- og ungdómspsykiatriini. Hetta hóast avbjóðingarnar hava verið týðiligar í fleiri ár. Manglandi lýsingarnar, og tað at børnini

hava havt trupulleikar í langa tíð, áðrenn tey fáa hjálp, hevur við sær, at arbeiðsgongdin við útgreining verður drúgvari.

Til spurning 4
Samanumtikið verður mett, at sálarliga støðan hjá børnum og ungum als ikki er góð í dag. Hesar seinastu mánaðirnar hevur Barna- og ungdómspsykiatriin fingið munandi fleiri ávísingar enn vanligt, har talan er um akuttar ella subakuttar støður. Tey síggja ein størri tørv á innleggingum í barna- og ungdómspsykiatrisku dageindini, og samstundis eru eisini fleiri børn, sum eru samdøgursinnløgd á seingjardeildini í vaksinpsykiatriini. Samanumtikið uppliva tey, at støðan er versnandi hjá fleiri børnum og ungum, og langa bíðitíðin ger støðuna enn truplari fyri tey og teirra avvarðandi. Vaksandi talið av børnum og ungum við álvarsligum sálarligum avbjóðingum merkir aftur, at tey, ið hava lættari sjúkutekin, verða sett afturum í bíðirøðina, sum so økir um vandan fyri, at eisini tey verða álvarsliga sjúk. Tí hevur tørvurin á fyribyrgjandi og skjótari hjálp ongantíð verið størri enn nú.

Til spurning 5
Tá eitt barn er útgreinað, kallar Barna- og ungdómspsykiatriin viðkomandi partar inn til netverksfund, eitt nú Sernám, Gigni, Almannaverkið og skúli/stovnur. Á fundinum greiðir Barna- og ungdómspsykiatriin frá teirra niðurstøðum og tilmælum. Netverksfundurin er sambært Barna- og ungdómspsykiatriin ein týðandi fortreyt fyri, at stuðulstiltøkini til og um barnið verða samskipaði, tá útgreiningin er liðug.

Sjúkrahúsverkið hevur annars gjørt vart við, at tey meta ikki, at samskipanin millum geirar eydnast nóg væl, og tað hevur við sær, at fleiri børn og ung ikki fáa nóg dygga hjálp.

Tað hevur tí eisini stóran týdning at menna samstarvið tvørturum geirar fyri at fyribyrgja mistrivnað hjá børnum og ungum í Føroyum og harvið minka um tørvin, at hesin málbólkur yvirhøvur verður ávístur til Barna- og ungdómpsykiatrina. Í hesum sambandi verður neyðugt at fáa ment samstarvið og eisini mett um tørvin á teimum tænastum, sum t.d. Sernám og Gigni veita kring landið. Í hesum sambandi hava fundir verið millum undirritaða landsstýrismann og landsstýrismannin í mentamálum fyri at umrøða, hvussu hetta kann gerast. Ætlanin er eisini at taka almannaøkið, kommunur og avvarðandi stovnar uppí hetta arbeiðið, sum skal tryggja eitt betri tvørgeiraligt samstarv, har fokus verður á fyribyrging og at veita skjóta hjálp til børn og ung, ið hava sálarliga avbjóðingar.

Samstundis verður arbeitt við at uppraðfesta psykiatriina. Tvær mió. kr. eru settar á fíggjarlógini fyri 2022 til m.a. at styrkja um viðgerðartilboðini í Barna- og ungdómspsykiatriini. Samstundis hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at raðfesta enn meira pening í ár til at fáa bíðilistarnar niður – hesum verður tað arbeitt við í løtuni. Sjúkrahúsverkið hevur, eftir áheitan frá landsstýrismanninum, gjørt eitt uppskot til, hvussu bíðilistin og bíðitíðin í Barna- og ungdómspsykiatriini ítøkiliga kann styttast. Tað er víst á ymiskar loysnir at minka um bíðilistarnar í Barna- og ungdómspsykiatriini. Hetta verður viðgjørt í løtuni.

Eisini hevur Landssjúkrahúsið víst á, at serlæknamangul hevur verið í Barna- og ungdómspsykiatriini seinasta árið ella so, og at tað hevur havt ávirkan á bíðitíðina.

Landssjúkrahúsið arbeiðir í løtuni við at seta serlæknakonsulent, sum saman við øðrum átøkum, vónandi fer at bøta um bíðitíðina.

Harumframt fór royndarskipanin at virka í fjør, soleiðis at tað verður bjóðað ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til aldursbólkin 15 til 35 ár, ið stríðast við angist ella lættari til moderat tunglyndi. Hetta fer vónandi at verða viðvirkandi til, at ávísingarnar til Barna- og ungdómspsykiatriina fyri tann eldra aldursbólkin (frá 15 ár til og við 17 ár) fer at minka.

Heilsumálaráðið, 2. mars 2022

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður